Viðfesti 1 Sandoy

Byggipláss í Djúpadali (1A1)

Viðmerkjast skal, at skrásetingarnar ikki eru lidnar, og at broytingar kunnu koma áðrenn kanningin er liðug.

Fuglur

Talt varð við Djúpadal.

Búfuglur: Tjaldur (*Haematopus ostralegus*), Spógvi (*Numenius phaeopus*), Mýrisnípa (*Gallinago gallinago*), Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*).

Talva 1. Váði, hvat væntast at ávirka fuglin: 1. Ljóðdálking. 2. Órógv undir bygging. 3. Beinleiðis skaði vegna samanbrest. 4. Miss av tilhaldslendi. 5. Broyting av lendinum. 6. Økt órógv undir vegagerð. 7. Økt varandi ferðsla eftir byggitíðarskeið. Avleiðing: + = positiv, 0 = ongin og – = negativ avleiðing. o/- merkir sostatt, at ongin ella kanska negativ avleiðing verður væntað. CMS stendur fyri Convention on Migratory Species (Bonnsáttmálin).

Fuglaslag	Tal pør	CMS	Reyðlisti	Viðmerk.	Váði. Væntað ávirkan	Avleiðing +/0/-
Tjaldur (*Haematopus ostralegus*)	5		NT	Nærum hótt	2, 5, 7	0/-
Mýrisnípa (*Gallinago gallinago*)	1-2	II	DD	Dátutrot	2, 4, 5	0/-
Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*)	0		EN	Hótt	2,3,4,5	0/-

Plantur

Øki í Djúpadali er bæði vátt- og turt hagalendi. Ein partur av lendinum er dyrkað, har veitir (avveiting) eru grivnar í gjøgnum lendið. Lendið ber brá av, at landbúnaður og búseting er í økinum. Í pørtum av økinum er nógv av biti. Flestu plantusløgini eru skrásett sum sera vanlig ella vanlig (sí viðfesti 6 fyri merking av týðleika stigi). Hesi plantusløgini eru ikki í vanda fyri at verða týnd. Tó eru tvey sløg skrásett at vaksa her og har. Bæði plantusløgini eru vátlendisplantur. Eitt plantuslag er skrásett at vera sjáldsamt, tað er Akurtistil (*Cirsium arvense*). Plantan er vanliga at finna við vegjaðarar. Mýristrá sp. (*Eleocharis sp.*) var eisini

funnin í tveimun støðum í Djúpadali. Staðfest er ikki enn, hvat fyri slag av mýristrái talan er um. Trý ymisk sløg eru skrásett av hesum plantuslagi í Føroyum. Mýristrá er vátlendisplanta, og er skrásett sum sjáldsom ella sera sjáldsom, og er at finna á tí føroyska reyðalistanum.

Tunnilsvegur 1A3 og partvís 1A4

Fuglur

Talt varð eftir vegum framvið Stóravatn.

Búfuglur: Tjaldur (*Haematopus ostralegus*), Stelkur (*Tringa totanus*), Lógv (*Pluvialis apricaria*), Spógvi (*Numenius phaeopus*), Svarthálsa (*Charadrius hiaticula*), Mýrisnípa (*Gallinago gallinago*), Svartbakur (*Larus marinus*), Helsareyði (*Phalaropus lobatus*), Stari (*Sturnus vulgaris*), Steinstólpa (*Oenanthe oenanthe*), Summartítlingur (*Anthus pratensis*), Grátítlingur (*Anthus petrosus*).

Talva 2. Váði, hvat væntast at ávirka fuglin: 1. Ljóðdálking. 2. Órógv undir bygging. 3. Beinleiðis skaði vegna samanbrest. 4. Miss av tilhaldslendi. 5. Broyting av lendinum. 6. Økt órógv undir vegagerð. 7. Økt varandi ferðsla eftir byggitíðarskeið. Avleiðing: + = positiv, 0 = ongin og – = negativ avleiðing. o/- merkir sostatt, at ongin ella kanska negativ avleiðing verður væntað. CMS stendur fyri Convention on Migratory Species (Bonnsáttmálin).

Fuglaslag	Tal pør	CMS	Reyðlisti	Viðmerk.	Váði. Væntað ávirkan	Avleiðing +/0/-
Tjaldur (*Haematopus ostralegus*)	5		NT	Nærum hótt	2, 5, 7	0/-
Lógv (*Pluvialis apricaria*)	3	II	VU	Viðbrekið	2, 4, 5, 7	0/-
Mýrisnípa (*Gallinago gallinago*)	1-2	II	DD	Dátutrot	2, 4, 5	0/-
Spógvi (*Numenius phaeopus*)	5	II	VU	Viðbrekið	2, 4, 5, 7	0/-
Fjallmurra (*Calidris alpina*)	0	II	CR	Sera hótt	2, 4, 5, 7	0/-
Stelkur (*Tringa tetanus*)	2	II	CR	Sera Hótt	2, 4, 5, 7	
Helsareyði (*Phalaropus lobatus*)	2	II	CR	Sera Hótt	3,7	
Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*)	0		EN	Hótt	2,3,4,5	0/-

Svartbakur (*Larus marinus*)	1-2 (s)		NT	Nærum hótt		
Stari (*Sturnus vulgaris*)	1 (s)					
Steinstólpa (*Oenanthe Oenanthe*)	7	II	NT	Nærum hótt	2,4,7	0/-
Grátíttlingur (*Anthus petrosus*)	2		NT	Nærum hótt	2,4,7	
Summartítlingur (*Anthus pratensis*)	6	II	NT	Nærum hótt	2,4,7	0/-

Plantur

Økið, har ætlan er at gera veg til Djúpadal (omanfyri Líðarenda og framvið Stóravatn), er bæði vátt- og turt hagalendi umframt øki við grytutum lendi. Økið er nógv merkt av mannahondum t.d. vegagerð og landbúnað (taðing, seyðabiti, traðir). Eisini er ein moldgoymsla í økinum. Lendið fram við vegnum og yvur til Ánna millum Vatna, er fyri tað mesta turt hagalendi, tó vátligt í støðum. Økið frá Ánni millum Vatna (frá brúnni) og suður um Stóravatn (bæði oman og niðanfyri vegin) er fyri tað mesta vátlendi við tjarnum og smærri áum/løkum, ið renna ígjøgnum lendið. Lendið niðanfyri vegin er heldur turrani enn omanfyri vegin. Eisini renna tvær stórar áir oman í Stóravatn, Áin millum Vatna og Tifaldará. Sunnan fyri Stóravatn (niðanfyri vegin) er eitt øki við grýtutum lendi, ið er heldur turraði enn restin av lendinum við Stóravatn.

Flestu plantusløgini eru skrásett sum sera vanlig ella vanlig. Seks sløg eru skrásett at vaksa her og har. Trý av hesum eru vátlendisplantur. Tvey plantusløg er skrásett at vera sera sjáldsom, tað er Hjartatjarnaks (*Potamogeton perfoliatus*) og Tjarnarsólja (*Ranunculus cf. reptans*). Bæði plantusløgini vóru funnin við og í Stóravatn og eru á tí føroyska reyðalistanum. Mýrustrá sp. var eisini funnin í økinum við Stóravatn. Staðfest er ikki enn, hvat fyri slag av mýristrái talan er um. Mýristrá er vátlendisplanta og eru skrásett sum sjáldsom ella sera sjáldsom.

Múlin 1A5a

Fuglur

Fuglur taldur við Múlan

Búfuglur: Tjaldur (*Haematopus ostralegus*), Spógvi (*Numenius phaeopus*), Tangspógvi (*Numenius arquata*), Mýrisnípa (*Gallinago gallinago*), Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*), Steinstólpa (*Oenanthe oenanthe*), Summartítlingur (*Anthus pratensis*).

Talva 3. Váði, hvat væntast at ávirka fuglin: 1. Ljóðdálking. 2. Órógv undir bygging. 3. Beinleiðis skaði vegna samanbrest. 4. Miss av tilhaldslendi. 5. Broyting av lendinum. 6. Økt órógv undir vegagerð. 7. Økt varandi ferðsla eftir byggitíðarskeið. Avleiðing: + = positiv, 0 = ongin og – = negativ avleiðing. o/- merkir sostatt, at ongin ella kanska negativ avleiðing verður væntað. CMS stendur fyri Convention on Migratory Species (Bonnsáttmálin).

Fuglaslag	Tal pør	CMS	Reyðlisti	Viðmerk.	Váði. Væntað ávirkan	Avleiðing +/0/-
Tjaldur (*Haematopus ostralegus*)	3		NT	Nærum hótt	2, 5, 7	+/0/-
Lógv (*Pluvialis apricaria*)	2	II	VU	Viðbrekið	2, 4, 5, 7	0/-
Spógvi (*Numenius phaeopus*)	3	II	VU	Viðbrekið	2, 4, 5, 7	0/-
Kjógvi (*Stercorarius parasiticus*)	0		EN	Hótt	2,3,4,5	0/-
Tangspógvi (*Numenius arquata*)	1	II	CR	Sera Hótt		0/-
Steinstólpa (*Oenanthe oenanthe*)	1	II	NT	Nærum hótt	2,4,7	0/-
Summartítlingur (*Anthus pratensis*)	2-3	II	NT	Nærum hótt	2,4,7	0/-

Plantur

Lendi við Múlan er hagalendi við skursl/grýtut lendi, lendi við samanhangandi vøkstri (ovari partur av lendinum) og lendi (oman í móti vegnum), ið er ávirkað av mannahondum (dyrkað lendi, træðir, landbúnaður). Eitt lítið vátlendisøki er við/runt tjørnina. Sum heild var lendið rættiliga turt.

Flestu plantusløgini í økinum eru skrásett sum sera vanlig ella vanlig, og hesi plantusløgini eru ikki í vanda fyri at verða týnd. Eitt plantuslag er skrásett at vaksa her og har, tað er Føroyskur klokkulyngur (*Erica cinerea*).